## Herferð ímóti aling

Norska uttanríkisráðið hevur biðið sínar sendistovur kring heimin vera á varðhaldi, nú ein felagsskapur er farin í hernað ímóti norsku laksaalingini. Felagsskapurin, sum nevnir seg Pure Salmon Campaign, ferðast kring heimin við einari sjónbandaupptøku, sum roynir at sannføra fólk um, at norðmenn skaða bæði fólk og náttúru við alistøðum, sum teir hava í Írlandi, Skotlandi, Kanada og Kili. Millum annað vil felagsskapurin vera við, at alistøðirnar, sum norðmenn eiga í Kili, brúka nógv meiri heilivág enn alistøðirnar heima í Noregi.




# Millum trúgv og vitan

**Stríðið millum trúgv og vitan, ímillum átrúna og politikk og ímillum vit og pátrúgv er evnið í bókini *Trúgv og vantrúgv*, sum A. Guttorm Djurhuus hevur týtt til føroyskt úr svenskum eftir Christer Sturmark**

TÝÐING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Sum dømi um, at átrúnaðarligur ágangur eisini er nakað, sum rakar í eini lítlari føroyskari bygd tekur týðarin Guttormur Djurhuus eitt barnaminni fram í byrjanini á bókini, har hann greiðir frá, hvussu hann sjálvur varð frelstur undir oki.

### Dundurtala í Kunoy

"Eg vaks upp í Kunoy hjá ommu og abba, Marin Malenu og Andrias Seyðberg, í Uppistovu, har prestur eisini gisti, tá ið hann kom til bíggjar at halda gudstænastu ella aðra kirkjuliga tænastu.

Tað var á sumri í 1948 at maður var deyður av vanlukku á fjalli. Maðurin var kirkjufólk, og fór sostatt til gravar úr kirkjuni, og kom prestur, N. J. Rasmussen, úr Klaksvík at jarða mannin. Fleiri av børnunum vóru vorðin limir í brøðrameinigheitini, og var henda sama dag ein av trúboðarunum frá samkomuni, staddur í bygdini, og hevði okkurt av børnunum biðið hann um at siga nøkur orð á grøvini. Tá ið prestur hevði lisið elligomlu mánabønina og kastað jørð á, fór trúboðarin yvir til prest og spurdi um hann kundi sleppa at siga nøkur orð. Tann hampamaður, ið prestur var, noktaði hann honum tað sjálvandi ikki. Trúboðarin bað so tey, ið vildu lurta eftir sær um at standa uppi og at fara úr húgvuni. Hini kundu fara. Sjálvur stóð eg undir liðini á abba og setti hann seg niður á ein stein og setti húgvuna á høvdið. Tí forvitin var hann og vildi hava at vita, hvat ið maðurin hevði at siga. Helst havi eg gjørt tað sama, hóast eg ikki minnist tað fyri vist. Húgvu havi eg tó neyvan havt.

So fór trúboðarin undir eina dundurrøðu. Ikki minnist meg rættiliga í staklutum, hvat ið hann segði, men inngangurin var nakað soleiðis: "Nú hava tit ringt og sungið henda mann til helviti..."

### Frelstur undir oki

Tá ið dundurrøðan var liðug, fóru abbi, prestur og eg spákandi Suður á Bø til Uppistovu. Ikki varð nakað sagt á leiðini, men báðir hesir tilkomnu menn, sum farnir vóru um miðan aldur, grótu. Ikki fór prestur í ervi, men varð sitandi uppi á prestakamarinum til hann fekk fart aftur til Klaksvíkar.

Frá tí degi av haldi eg meg at kunna siga, at eg var frelstur undan átrúnaðarligum oki. So var tað tá, og ikki er tað batnað. Helst tað øvugta.

Átrúnaðarligur yvirgangur er sostatt ikki nakað fremmant, sum bara er úti í heimi. Hann er so sanniliga eisini vanligur her heima hjá okkum sjálvum."

### Neyðug amboð

Guttormur Djurhuus vísir á, at við bókini leggur Christer Sturmark grundstøði undir einari humanistiskari lívsáskoðan, uttan nakran gud og aðrar yvirnatúrligar verur. Hann ber fram próvgrundir fyri eini sterkari trúgv á menniskja við humanistiskum og lívsjáttandi virðum í miðdeplinum. Lesarin fær tey neyðugu amboðini til at kunna møta pátrúgv, new age og aðrari átrúnaðarligari pátrúgv, frá einum føstum støði.

Christer Sturmark er føddur í 1964 í Stokkholmi, og hevur verið formaður í svenska humanistiska felagnum síðani í 2005, og hevur tey seinastu árini skrivað og hildið fyrilestrar um umhvørvisgreining og umhvørvisansing. Í dag stendur hann á odda fyri eini tankasmiðju undir uttanríkispolitiska setrinum, um týdningin av átrúna í altjóða politiki.

Tað er forlagið Rísandi sól, sum gevur út bókina, ið fæst í bókabúðunum.




*Við bókini »Trúgv og vantrúgv« fær lesarin nøkur amboð at møta pátrúgv frá einum føstum støði, sigur týðarin Guttormur Djurhuus*

## Øðrvísi myndabók til tey smáu

Nýggja bókin *Meinski Minkur* er ein øðrvísi myndabók, sum minnir um eina teknirøð í útsjónd og bygnaði. Hon er um minkin Minkur, sum er ein meinskur lúsaskarvur og ógvuliga, ógvuliga ríkur. Ein dagin skal hann halda eina stóra veitslu fyri at gera seg upp fyri øllum. Hann bjóðar øllum í veitslu, men skilur ikki, hví ongir gestir koma. Man tað vera tí, at Minkur er ein vána vinur?

Anna Maria Reinert hevur týtt bókina, sum Bókadeildin gevur út

**-ave-**




*Myndabókin »Meinski Minkur« minnir mest um eina teknirøð*

# Fregnir ressast við aftur

**Undir heitnum »Fregnartænastan« fara nakrir av pennunum, sum í síni tíð myndaðu blaðið Fregnir, nú aftur at gera vart við seg á heimasíðuni hjá Sprotanum**

TÆNASTA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Forlagið Sprotin fer nú undir eina tænastu við tíðindum um nýggjar bókaútgávur, greinir, málslig tíðindi og hugleiðingar.

Tænastan fer at ganga undir heitinum Fregnartænastan, og her fara nakrir av landsins nógvu pennum at skøra í tilveruni við griflinum - umframt nógv teirra, sum á sinni skrivaðu blaðið Fregnir.

Fregnartænastan fer at kunna um nýggju greinirnar gjøgnum teldupost við leinki til heimasíðuna hjá Sprotanum á www.sprotin.fo, har fólk kunnu melda til tíðindi frá tænastuni.

Í skrivi boðar Fregnartænastan frá, at innihaldið í greinunum verður ikki á nakran hátt avmarkað til bókmentir og mál.

Tær hjartans meiningar, ið tey skrivandi hava um øll hugsandi viðurskifti, sleppa fram í ljós her - hugleiðingar, viðmerkingar av ymsum slagi, okkurt skemt, kanska onkrar politiskar greiningar, onkrar forvitnisligar søguligar keldur, kunningar um nýggjar bøkur, ummæli og umrøður.

Longu nú ber til at lesa fyrstu greinarnar frá Fregnartænastuni, sum halda seg til eittans mál:

»Teksturin skal verða so mikið væl skrivaður, at hann er verdur at lesa. Tað skal vera vert at brúka løtuna at lesa tekstin«, verður sagt.




*Longu nú ber til at lesa fyrstu greinarnar frá Fregnartænastuni hjá Sprotanum*